UTTAN ÚR HEIMI

# Ísrael reisur nýggjan múr




*Higartil er múrurin sum skal skilja Ísrael frá Vestara Áarbakka 128 kilometrar langur, men ætlanin er at hann skal vera næstan 1000 kilometrar.*

*Mynd: Reuters*

**Mitt í royndunum at tingast um varandi frið millum Palestinar og Ísrael, reisir Ísrael ein múr, sum skal skilja Vestara Áarbakka frá Ísrael. Múrurin ella hegnið, sum summi kalla hann, skorar seg inn í palestinskar bygdir og rundan um ísrelskar búsetingar á hersettu økjunum.**

ÍSRAEL
*Øssur Winthereig: ossur@post.olivant.fo*

Ein nýggjur múrur – longri og hægri enn Berlin-múrurin – verður nú bygdur. Ein múrur, sum grevur seg eirindaleyst gjøgnum bygdir og jarðarteigar. Tað er ísrelska verjumálaráðið, sum stendur fyri byggingini av múrinum.

Múrurin, sum summastaðni er eitt høgt hegn, skal skilja Ísrael frá Vestara Áarbakka.

Tað eitur seg, at múrurin skal tryggja Ísrael móti fíggindum uttanifrá – einamest sjálvmorðsbumbumonnum. Men múrurin fylgir ikki markinum millum Ísrael og Vestara Áarbakka – sonevndu grønu linjuni. Markið millum Ísrael og hersettu økini er altjóða viðurkent, so um múrurin fylgdi hesum markinum, bar til at siga, at tað var ein søk fyri Ísrael, hvussu landið gjørdi við sítt egna land.

Men nýggi múrurin verður bygdur inni á hersettu økinum og tekur beinleiðis land frá palestinskum bøndum.

Múrurin er átta metur høgur og báðumegin er ein sonevndur trygdargeiri onkustaðni heilt upp í 100 metrar, har ymsar elektroniskar vaktarskipanin verða settar upp. Samanborið við Berlin-múrin er hann tvær reisur so langur og tríggjar ferðir so høgur.

## Óndsinnað hegn

Herbert Pundik, fyrrverandi blaðstjóri á dagblaðnum Politiken, og sum býr í Ísrael, skrivar soleiðis um múrin:

– Um tað ber til at geva múrinum menniskjaligar eginleikar, so er talan um eitt óndsinnað hegn við samsvarandi avleiðingum fyri grannalagið millum ísraelsfólk og palestinar.

Markið millum Ísrael og hersettu økini er 350 kilometrar, men um ætlanin hjá ísrelska verjumálaráðnum gongur út, verður lidni múrurin fleiri hundrað kilometrar longri – summar keldur siga 900 kilometrar. Higartil eru 128 kilometrar av múrinum lidnir.

Múrurin skal sik-sakka seg gjøgnum landslagið, fyrst og fremst fyri at leggja flest møguligar ísrelskar búsetingar á hersettu økinum innanfyri múrin. Men fleiri av bestu landbúnaðarøkjunum á Vestra Áarbakka enda eisini innanfyri múrin – Ísraelsmeðni.

Á tann hátt er veruleikin, at Ísrael nú leggur nýtt land undir seg. Talan er um eini fimm og 10 prosent av palestinska landinum, sum í roynd og veru verður ognartikið.

Eingin ivi er um, at talan er bæði um brot á Geneve-sáttmálan um hersetingarvald og um brot á Oslo-sáttmálan, har Ísrael og Palestina bundu seg til ikki at broyta verandi mark.

Í Ísrael fær Sharon góðan stuðul til byggingina av múrinum. Verjumálaráðið og herurin hevur sannført nógv fólk í Ísrael um, at múrurin skal byrja fyri sjálvmorðsatsóknum. At múrurin samstundis herðir kreppuna millum Ísrael og Palestina, tykist ikki at nema við.

Í vikuni vóru altjóða mótmælisgongur við múrin ella hegnið og umleiðs hálvthundrað mótmælisfólk vóru tikin – av teimum einir 30 útlendingar. Mótmælisfókini bíðaðu á grundstykkinum hjá eini palestinskari familju, sum við múrinum missir sínar ognir.

## Nýggjur veruleiki

Ætlanin hjá Ariel Sharon er at skapa ein nýggjan veruleika á Vestara Áarbakka. Ein veruleika, sum so verður útgangsstøðið fyri møguligum samráðingum um varandi frið í Miðeystri. Ariel Sharon hevur sagt seg taka undir við »road-map« ætlanini fyr friði. Ein ætlan, sum er gjørd í samstarvi millum ES, ST, USA og Russland.

Ísrael er í tí støðu at fólkatalið millum palestinar veksur nógv skjótari enn millum ikki-arábarararnar í Ísrael. Um Ísrael hevði lagt allan Vestara Áarbakka undir seg so høvdu palestinarar skjótt verið í meiriluta, um ætlanin var at gera eina demokratiska skipan. Hetta er sjálvandi ein hóttan móti teimum, sum halda uppá, at Ísrael skal vera ein jødiskur statur. Júst tí kann múrurin eisini síggjast sum ein máti at halda palestinum burtur úr Ísrael.

Fyrstu avleiðingarnar eru merktar í lítlu bygdini Kalquilia á hersetta Vestara Áarbakka. Bygdin sjálv er við eitt endað skeivu megin nýggja múrin og er avbyrgd frá restini av Vestara Áarbakka. Bøndur hava sæð ísraelskar buldosarar jarðleggja velturnar, har teir velta oljuber ella víndrúvur. Í bygdini vóru einir 20 vatnbrunnar, men nú eru bara helvtin eftir. Hinir eru antin fyltir upp ella ísraelsmeðni múrin.

Veltur og øki, sum í fleiri hundrað ár hava verið grundarlagið undir bygdini, er sorlað sundur av buldosarunum. Bøndurnir hava ikki frítt at fara í tí økinum, har teir áður hava velt. Ísrelsku myndugleikarnir siga, at møguleiki skal vera fyri at gera nøkur portur í múrin, so bøndurnir sleppa innum ella útum at heysta í egnum veltum.

## Bush var varin

Júst nýggi múrurin á hersettu økinum var á skránni tá George Bush, forseti, hevði fund við ísrelska forsætisráðharran Ariel Sharon og nýggja palestinska forsætisráðharran Mahmoud Abbas.

Summi væntaðu at amerikanska forsetin fór at kroysta Sharon til at steðga byggingini av múrinum, men tíðindafundirnir eftir fundin í Washington bendu ikki á, at Bush hevur kravt, at byggingin steðgar.

Byggingin av múrinum hevur ávirkan á »road-map« – koyriætlanina fyri friði. Henda ætlan skinklar í skræðuni, men tykist í løtuni at vera einasta gongda leið til varandi frið.

Sjálvt um Bush ikki kravdi beinleiðis at byggingin skuldi steðgast, so eru tekin um, at amerikanska fyrisitingin stúrir fyri støðuni. Amerikanski uttanríkisráðharrin – Colin Powel – hevur heitt á ísrelsku myndugleikarnar um at hugsa seg væl um.

Keldur í amerikansku fyrisitingini hava sagt við New York Times, at fleiri amerikanskir politikarar eru fyri at frysta nýggjstu veðhaldini fyri láni til ísrelsku stjórnina.

USA er ikki ímóti, at Ísrael byggir ein múr ella eitt trygdarhegn á egnum øki, men at Ísrael við múrin fer inn á Vestara Áarbakka og Ísrael á tann hátt leggur nýtt land undir seg hóttir »road-map«-ætlanina. Við múrin ger Ísrael sítt egna mark.

Amerikanska kongressin hevur í vár veitt Ísrael veðhald fyri lánum upp á níggju milliardir dollarar og tað eru hesi veðhaldini, sum amerikansku myndugleikarnir nú hótta við at minka.



*Amerikanski forsetin segði seg harmast um nýggja múrin millum Ísrael og Vestara Áarbakka, sum stingur seg inn á hersettu økini og leggur nýggj øki afturat Ísrael*

*Mynd: Reuters*

## Koyriætlanin fyri friði í Miðeystri:

Koyriætlanin – the road map – fyri friði millum palestinar og ísraelar er løgd til rættis av ES, ST, USA og Russlandi.

**Endamál:**
Ein endalig og altumfatandi loysn á trætuni millum Ísrael og Palestina, sum skal enda við einum demokratiskum palestinskum stati lið um lið við Ísrael.

**Tíðarætlan:**
Ætlanin er í trimum stigum, har seinasta stigið verður tikið í 2005.

**1. stig:**
Harðskapur og yvirgangur skal steðgast. Palestinar skulu kunna liva eitt vanligt lív og palestinskir stovnar og mynduleikar skulu setast á stovn.

**2. stig:**
Ein palestinskur statur verður settur á stovn við fyribils marki. Samstundis verður hildin ein altjóða ráðstevna, sum skal útvega pening til nýggja statin.

**3. stig:**
Endaliga avtalan um at enda trætuna verður undirskrivað. Málið er ein palestinskur statur í 2005 við mørkum, sum eru altjóða viðurkend.

## Tøl úr Ísrael

- Íbúgvaratalið í Ísrael er í alt 6.631.000
- Av teimum búgva 225.000 jødar í búsetingum á Vestara Áarbakka í umleið 150 búsetingum.
- 8.000 búgva í búsetingum í Gaza
- 1,2 mio. av fólkinumi í Ísrael eru arabarar
- Íbúgvaratalið á Vestara Áarbakka er umleið 2 mill.
- Íbúgvaratalið í Gaza er umleið 1,2 mill.